# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Um nakrar dagar fara vit at kunngera, at Obama hevur vunnið dystin við Hillary Clinton*

*(talsmaður hjá Barrack Obama)*

# Hevnd fyri tekningarnar av Mohammed profeti

**Danska sendistovan í Islamabad hevur fingið fleiri hóttanir í sambandi við tekningarnar av Mohammed. Í morgun gjørdist hóttanin veruleiki**



*Minst átta fólk doyðu, og fýra fingu skaða (Mynd: AP)*

Minst átta fólk doyðu, og fýra fingu skaða, tá ein sterk bumba brast uttan fyri donsku sendistovuna í pakistanska høvuðsstaðnum Islamabad í morgun. Øll vóru pakistanar.

Pakistanska løgreglan heldur fyri vist, at talan var um eina sjálvmorðsatsókn, men aðrar keldur vildu vera við, at tað var ein bilbumba. Tað er eisini hugsandi, at so er, og at sjálvmorðsbumbumaðurin sat við róðrið.

AFP-tíðindastovan skrivar, at spreingingin var so hørð, at sendistovan fekk stóran skaða, og at tveir aðrir bygningar eisini fóru illa. Sjónvarpsmyndir vístu, at portrið uttan fyri sendistovuna var oyðilagt, og at eitt stórt hol var í vegnum uttanfyri.

Eygleiðarar ivast ikki í, at tað eru víðgongdar kreftir, sum hava skipað fyri atsóknini fyri at hevna tekningarnar av Mohammed profeti. Teir seinastu mánaðirnar hava tað javnan verið nótmælisgongur ímóti Danmark og tekningunum, og ssendistovan í Islamabad hevur fingið fleiri hóttanir um atsóknir. Tað hevur norska sendistovan eisini fingið, og norska stjórnin flutti í morgun fólkið av sendistovuni í býnum.



*Hillary Clinton vann, men tað er ov seint (Mynd: Polfoto)*

## Greiður men nyttuleysur sigur

**Hillary Clinton vann í Puerto Rico, men hon fær einki gagn av sigrinum. Tað er ov seint**

Hillary Clinton vann ein greiðan sigur í Puerto Rico. Staturin sendir 55 valmenn til tann endaliga uppstillingarfundin hjá demokratunum í august, og sambært teimum seinastu tølunum fekk Hillary Clinton 41 teirra, meðan Barrack Obama fekk hinar 14.

Men sigurin er at kalla nyttuleysur. Leygardagin vann Obama kjakið um valmenninar úr Florida og Michigan, soleiðis at teir sleppa á uppstillingarfundin, men fáa bara eina hálva atkvøðu hvør. Tað var ein dyggur smeitur fyri Hillary Clinton, sum fekk størri stuðul í báðum statunum.

Sambært CNN tørvar Barrack Obama nú millum 50 og 60 valmenn afturat fyri at fáa teir neyðugu 2.118 valmenninar. Tvey uppstillingarval eru eftir. Tey eru í morgin í Montana og South Dakota.

**STUTT SAGT**

## Skulu styðja Mugabe

Ovastin fyri zimbabwiska stjórnarherinum hevur givið øllum landsins hermonnum boð um, at teir skulu velja Robert Mugabe, forseta á umvalinum, sum verður tann 27. juni. Gera teir ikki tað, fáa teir sekkin, sigur herovastin. Herovastin sigur í sínum boðum til hermenninar, at andstøðuvalevnið, Morgan Tsvangirai, gongur ørindi fyri fremmandar leiðarar, sum vilja beina fyri allari menning í Zimbabwe. Í seinastuni hevur herleiðslan sent hermenn út um landið. Almenna frágreiðingin er, at teir skulu tryggja lóg og landaskil upp undir valið, men mannarættindafelagsskap ir siga, at hermenninir gera seg inn á andstøðufólk.



*Robert Mugabe og konan Grace (Mynd: AP)*

## Osama skotin

Í tveir mánaðir hava indiskir hermenn og løgreglumenn jagstrað ein fíl, sum hevði gjørt um seg í fleiri bygdum og traðkað minst ellivu fólk í hel har eysturi í landinum. Hendan framferðin gav fílinum eyknevnið Osama eftir tí kenda yvirgangsleiðaranum. Men nú kunnu fólk kenna seg trygg, tí fríggjakvøldið eydnaðist tað løgregluni at koma fílinum so nær, at tað bar til at skjóta hann.

Myndugleikarnir í landspartinum Jharkhand siga, at tey seinastu fýra árini hava villir fílar beint fyri umleið 400 fólkum har. Bygdafólk royna at verja seg sum frægast, og hildið verður, at tey hava skotið einar 150 av hesum villu og illu fílunum, skrivar Reuters.